## Nógvir sjúklingar

Støðugt fleiri fólk fara til Danmarkar at leita sær læknahjálp, og tað sæst aftur á føroyska sjúklingahotellinum í Keypmannahavn. Tølini vísa, at í 2001 brúktu 1.400 sjúklingar hotellið, men at talið var 1.900 í fjør. Samstundis vaks talið á teimum, sum vóru í fylgi við sjúklingum, úr 1.000 í 1.300. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, segði í Løgtinginum í gjár, at arbeitt verður við at finna betri gistingarumstøður til sjúklingarnar.

## Fyrireika framsýning

Listafelagið hevur biðið Heiðrik á Heygum og Jóannes Lamhauge fyrireika ta árligu Ólavsøkuframsýningina í ár. Teir skulu finna listafólk, velja verk og leggja framsýningina til rættis. Listafelagið sigur, at ætlanin er at blása nýtt lív í framsýningina og at geva fólki eina fullkomiliga øðrvísi uppliving enn áður. Ólavsøkuframsýningin verður sum vant í Listasavni Føroya og verður opin frá ólavsøkuaftan til tann 12. august.

# Bíða eftir niðurstøðu um fólkaskúlan

**Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, hevur ikki tikið støðu til, hvat hann fer at mæla samgonguni til viðvíkjandi fólkaskúlanum. – Nú mugu vit fyrst kanna, hvussu vit kunnu hækka tímatalið til innskúlingina, so vit ikki leypa framav, sigur hann**

SKÚLAMÁL

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Enn hevur landsstýrismaður í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, ikki tikið støðu til, hvat hann ítøkiliga fer at mæla samgonguni til, eftir aðalorðaskifti var um fólkaskúlan týsdagin. Eitt orðaskifti har tingfólk úr øllum flokkum vóru samd um, at innskúlingin skal hava fleiri tímar, umframt at játtanin til undirvísingartilfar skal hækkast. Sagt var, at tilmælið frá landsstýrismanninum er ov lágt sett, tá hann skjýtur upp at geva 1. og 2. flokki ein tíma afturat á hvørjum ári, tey næstu trý árini.

Fleiri tinglimir róðu framundir, at tímatalið eigur at vera ájavnt tímatalinum í hinum norðurlondunum, so 1. og 2. flokkur fer upp í 25 tímar.



*- Vit mugu kanna, um vit hava neyðugu lærarakreftirnar, og um rúm er fyri fleiri tímum í skúlunum, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, um at hækka tímatalið í innskúlingini.*

### Kanna fyrst

Men landsstýrismaðurin hevur sum sagt ikki tikið endaliga støðu til, hvat hann fer at mæla samgonguni til.

- Tað er altíð ringt at fáa pengar, so eg tori ikki at lova nakað enn, sigur Jógvan á Lakjuni, sum ivast í, um hann fær samgonguna at játta neyðuga peningin.

- Í fyrsta umfari haldi eg, at vit skulu kanna, hvussu vit kunnu hækka tímatalið til innskúlingina, so vit ikki leypa framav. Millum annað um vit hava neyðugu lærarakreftirnar, og um rúm er fyri fleiri undirvísingartímum í skúlunum, sigur landsstýrismaðurin, við Sosialin.

- Tað er ikki víst, at tað er rætt at hækka tímatalið. Hetta er nakað sum vit mugu viðgera í samgonguni. Eisini skulu vit kanna, um tað møguliga ber til at taka nakrar tímar frá teimum eldru næmingunum, tí teir hava eins nógvir, ella fleiri tímar, enn næmingarnir í hinum norðurlondunum, sigur Jógvan á Lakjuni

Konfronteraður við, at føroyskir næmingar eisini hava danskt, og at teir tískil neyvan hava fleiri, men heldur færri undirvísingartímar enn norðurlendsku næmingarnir, viðgongur landsstýrismaðurin, at nakað eru tað.

- So kanska er tað ikki so skilagott at taka frá teimum eldru kortini, sigur hann.

### Seta okkum mál

Annars kundi hann hugsað sær, at flokkarnir gingu saman í einari breiðari semju, sum síðani setti sær eitt mál, ið skal røkkast innan eitt ávíst áramál - kanska trý ár.

Spurdur, um talan møguliga verður um eina eykajáttan til fólkaskúlan longu í hesum fíggjarárinum, sigur landsstýrismaðurin, at tað absolutt er ein møguleiki.

- Hetta var eisini uppi og vendi í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini, sigur hann at enda.

# Tímatalið til innskúlingina skal upp

**Semja er um, at vit skulu upp á norðurlendska tímatalið í innskúlingini. Næsta stigið verður at leggja hækkingina til rættis, sigur Andrias Petersen, formaður í Mentanarnevnd Løgtingsins**

SKÚLAMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nógv hava fýlst á, at tilmælið um at hækka tímatalið til innskúlingina hjá landsstýrismanninum í skúlamálum, var ov varið. Ein teirra var Andrias Petersen, framsøgumaður Javnaðarfloksins, undir aðalorðaskiftinum týsdagin.

- Útspælið við einum tíma í ár, og einum aftur næsta og triðja ár, munar ikki nógv. Ongin ivi skal vera um, at tímatalið til innskúlingina skal upp á norðurlendska støðið. Nú er spurningurin bara, hvussu vit ítøkiliga leggja hækkingina til rættis, so vit ikki enda við at senda studentar inn í smáu flokkarnar, tí lærarastaburin ikki er til reiðar at taka nógvu eyka tímarnar uppá seg, sigur Andrias Petersen.



*Vit mugu leggja hækkingina av tímatalinum til rættis, so vit ikki enda við at senda studentar inn í smáu flokkarnar, sigur Andrias Petersen.*

### Tekur tíð

Spurdur, um fólk, sum send børn síni í 1. flokk eftir summarfrítíðina, fáa eitt betri tilboð, enn tey høvdu fingið í fjør, sigur Andrias Petersen, at tað vallað fer at síggjast aftur longu í august í ár.

- Royndirnar við politisku skipanini siga mær, at her hendir onki eftir einum degi. Nú bíða vit eftir einum ítøkiligum útkasti frá Mentamálaráðnum, og vón mín er, at hækkingin kann fara fram tvey ella trý næstu árini, sigur Andrias Petersen.

### Virkin andstøða

Í blaðnum í gjár, segði Heidi Petersen, framsøgukvinna í skúlamálum hjá Tjóðveldisflokkinum, at um samgongan ikki kemur við einum skjótum og ítøkiligum uppskoti um at hækka tímatalið munandi beinanvegin, so fór flokkur hennara at leggja uppskot um eykajáttan fyri tingið. Til hetta sigur Andriast Petersen, at sjálvandi ger Tjóðveldisflokkurin tað.

- Tað høvdu vit eisini gjørt, um vit sótu í andstøðu. Tá hevur tú onki at missa, men alt at vinna, sigur Andrias Petersen.

## FAKTA

Um tímatalið til allar 50 1. flokkarnar hækkar úr 18 upp í 25 tímar um vikuna í einum, kostar tað umleið 4,5 milliónir krónur í læraralønum. At hækka tímatalið í 2. flokki úr 20 upp í 25 tímar kostar umleið 3,5 milliónir krónur.

*Kelda: Mentamálaráðið*